## Meistari í Playstation 3

**Klaksvík:** Leygardagin kl. 11 byrjar ein heldur øðrvísi kapping í Klaksvík. Tá skal nevniliga FM-vinnarin í FIFA 08 til Playstation 3 finnast við eina kapping sum er ætlað teimum 13 ára gomlu og eldri. - Tiltakið er gjørt fyri at skapa eitt sindur av spenningi í gerandisdegnum og fyri at geva øllum FIFA-spælarunum ein møguleika fyri at vísa havt teir duga, siga fyrireikararnir sum eru fyritøkan EL-IN og KÍ-Café'in sum skipa fyri, og er høvuðsvinningurin ein 32" flatskíggi. Nógv verður annars gjørt burtur úr degnum. Av tí at plássið er avmarkað er neyðugt við tilmelding.



## Eini sethús í gerð

**Sandur:** Á fleiri støðum heima á Sandi eru fólk í ferð við at seta føtur undir egið borð. Eisini á einum staði tey nevna í Sandabrekkuni (myndin) er gongd í. Har er ein grund í gerð til eini sethús. Tað er TJK-smíð, ið ger stoypiarbeiðið, skrivar heimasíðan bkv. fo. Grundin stendur niðanfyri vegin, har eini onnur hús standa, ið nærum eru klár at flyta inní. Fleiri grundstykki har eru seld.

## Trupult at sleppa av við fiskin

**Útróðrarmenn í Sandoynni hava trupulleikar at sleppa av við fiskin. Teir mugu annaðhvørt sigla ella sjálvir koyra fiskin til góðkenda landingarmiðstøð. Henda trupulleikan ynskir sandoyartingmaðurin Páll á Reynatúgvu at gera nakað fyri**

ÚTRÓÐUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Sandoy:** - Einskiljingin av Farmaleiðum hevur í summum førum viðført eitt munandi verri tænastustøði hjá føroysku brúkarunum, sigur Páll.

Hann ætlar sær í fyrsta umfari at spyrja fiskimálaráðharran, Torbjørn Jacobsen um hesin trupulleikin við flutninginum bert er galdandi fyri útróðrarmenn á Sandoynni.

- Tað kann eisini vera, at trupulleikin er størri enn so!

Tað eru serliga útjaðaraøkini, sum kenna til sviðan av hesum afturstigi og trupulleika.

### Hættisligur flutningur

Í Sandoynni mugu útróðrarmenn sjálvir sigla ella koyra veiðuna til landingarmiðstøð á meginøkinum.

- Hetta er ein støða sum í summum førum, serliga vetrarhálvárið kann vera hættislig, og undir øllum umstøðum er sera trupul.

-Sæð við tænastubrillum, so er støðið als ikki nøktandi í 2008, slær Páll á Reynatúgvu fast.

Hann ynskir tí at vita frá fiskimálaráðharranum hvørjar ætlanir hann hevur, til tess at betra um umstøðurnar hjá útróðrarmonnum, so veiddi fiskurin verður førdur til góðkenda landingarmiðstøð á ein skipaðan hátt.

# Skip til útoyggjar mugu raðfestast fyrst

**- Framtíðin á útoyggjunum sær bjartari út nú, um ein skal trúgva tí sum stendur í samgonguskjalinum, sigur Útoyggjafelagið. Umboðsráðsfundur varð hildin fríggjadagin og her var semja um, at vón er fyri framman. Men enn vantar nógv í!**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Svínoyingar leingjast eftir einum nýggjum skipi. – Másin hóskar ikki til krøvini í dag, sigur Sigvard Johannesen (næstuttast vinstrumegin)*

*Mynd: Høgni Thomsen*

**Útoyggjar:** - Másin er eitt gott skip, men er ikki hóskandi til krøvini í dag. Tað hevði ikki verið verri við einum nýggjum skipi, sigur stýrimaðurin umborð á Másanum, Sigvard Johannesen.

Sosialurin hitti hann ein vakran septemberdag í Fugloyarfirði, tá Másin hevði lagt enn ein túr frá landi av Hvannasundi fyri at røkja ferðasambandið hjá fugloyingum og svínoyingum.

Víst varð í greinini á, at hóast Másin er eitt gott skip í sjónum, er tað als ikki dagført til krøvini í dag, millum annað tí at hann gongur so seint.

Serliga á vetrartíð veit manningin at siga frá nógvum ringum túrum um Fugloyarfjørð, har tað hevur brotið í bæði borð, um ein so kann siga.

Sigvard er ikki einsamallur í hesi støðutakan síni og ynskjum sínum: Oyggjarfólkið ynskir somuleiðis eitt meiri hóskandi far til hesa siglingina. Og nú fáa tey so eisini stuðul frá teirra felagi – Útoyggjafelagnum.

Á fundinum fríggjadagin varð tí staðfest, at nógvir av trupulleikunum hjá útoyggjunum botna í vantandi undirtøku frá politiskari síðu.

- Orsøkin til hetta er hin einfalda, at innlitið og forstáilsið ikki er nóg stórt. Tí kann tað bara vera ein fyrimunur, at útoyggjarnar nú hava fingið eina talskvinnu inni í skipanini, ið kann tosa sakina hjá okkum, sigur felagið og vísir til nýggju løgtingskvinnuna, Olgu Biskopstø, sum hevur verið skrivari í felagnum.

Tann nýggja menningarætlanin og ætlanir um fleiri tiltøk á útoyggj eru viðurskifti sum hava stóran áhuga hjá felagnum.

### Nýggj skip

Á fundinum fríggjadagin varð gjørdur ein listi yvir átrokandi mál, sum ynski eru um at fáa framd tey komandi árini.

Millum hesi evnini var útbyggingin av infrakervinum, sum skal gerast í eini greiðari raðfesting bæði á sjógvi og landi.

Nógv verður tosað um nýggjar tunlar og havnir, men fyri felagið hevur tað alstóran týdning at viðurskiftini innan samferðsluna á útoyggjunum ikki verða gloymd.

- Mest átrokandi er at fáa nýggj og hóskandi skip til Fugloyar og Svínoyarleiðina, Mykinesleiðina og Skúvoyarleiðina, staðfestir felagið.

Víst verður samstundis á tað neyðuga í, at Hestleiðin skal dagførast við fleiri túrum um dagin, eins og kannast skal nær tey nýggju skipini til Kalsoyar- og Nólsoyarleiðirnar gerast veruleiki.

Eitt annað mál, sum varð tikið fram var tørvurin á at fáa ein veg oman á lendingina í Mykinesi, nýggja havn í Skúvoy og at gera eina nýggja atløgu í Koltri.

### Hestur má við

Nógva tosið um undirsjóvartunlar millum oyggjarnar hevur eisini stóran áhuga í Útoyggjafelagnum – serliga tann nógv umtalaði Sandoyartunnilin.

- Vit eru av teirri greiðu fatan, at Hestur skal knýtast upp í henda tunnilin, hóast hetta kemur at seinka ætlanini nakað, sigur felagið.

Eitt annað mál á sama borði er uppskotið um ein slíkan tunnil til Svínoyar – og møguliga eisini til Fugloyar.

Felagið sigur, at eru hetta ætlanir ið kunnu gjøgnumførast, eigur ein at arbeiða víðari við hesum.

- Men, sigur felagið. – Hetta skal tó ikki verða nýtt sum undanførsla fyri at ábøtur ikki verða gjørdar her og nú á hesi farleiðini, sigur umboðsráðið í Útoyggjafelagnum.

> *Nógvir av trupulleikunum hjá útoyggjunum botna í vantandi undirtøku frá politiskari síðu. Orsøkin til hetta er hin einfalda, at innlitið og forstáilsið ikki er nóg stórt*
>
> *(Útoyggjafelagið)*